lívdin
- í lívd hins hægsta

Mars 2008



# Spennandi tiltak fyri børn í 4. flokki og eldri



*Magni og Rakul saman við sunnudagsskúlabørnunum*

Sunnudagin 24. februar byrjaði eitt nýtt spennandi tiltak fyri børn í 4. flokki og eldri, ið verður hvønn sunnudag, samstundis sum sunnudagsskúlin og seinna møtið eru.

Rakul Eysturtún og Magni á Lakjuni hava høvuðsábyrgdina fyri tiltakinum, og á familjumøtinum greiddu tey frá tiltakinum, og hvørjar ætlanir eru við tí. Rakul og Magni siga, at nógv spennandi og gott verður á skránni.

Brúk er fyri hjálparfólki til tiltakið, og áhugað vera biðin um at venda sær til Rakul á tel. 323282 / 523282 ella Magna á tel. 318686 / 568080.

Meira verður at frætta um tiltakið á heimasíðuni: www.livdin.fo

## Tað er fullgjørt

„Trúfastur er Gud, sum tit vórðu kallað við til samfelag við Son Hansara, Jesus Kristus, Harra okkara" (1. Kor. 1:9.)

Páskirnar minna okkum á Guds stóra kærleika til okkara. Hesin kærleiki og henda náði leiddu Jesus allan vegin út á krossin. Í urtagarðinum var Hann í stórari angist, og sveitti Hansara var sum blóðsdropar. Hann kendi sviðan av, at Hansara egnu sviku Hann. Hann varð órættvíst ákærdur. Hann varð spýttur á og spottaður. Rómverskir hermenn slógu Hann við rørstavi.

Hann varð húðflongdur við leðurreim við jarn- og beinpíkum í, sum skræddu upp rygg Hansara. Hann mátti bera Sín egna kross, sum Hann hoknaði undir. Hann var nektaður og mátti síggja vanæruna og skommina í eyguni, sum tað bar við sær. Hann varð negldur gjøgnum hendur og føtur. Hann hekk á krossinum saman við ránsmonnum, hóast Hann var ósekur og vit tey seku. Hann gav upp anda Sín og doyði. Men tað var hetta rópið: „Tað er fullgjørt", sum endurnýggjaði samfelagið, ið var slitið av syndarinnar ávum! Jesus reis upp og gav okkum LÍV. Hann reis upp og førdi okkum út úr myrkrinum og inn í ljósið. Hann reis upp og gav okkum rættvísi Guds. Hann reis upp og gav okkum frið við Gud. Halleluja! Hann er upprisin!


*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Tillukku við próvnum

**Beinta Káradóttir**
**bachelor í sjúkrarøkt**

Mikudagin 30. januar fekk Beinta Káradóttir í Hoyvík prógv sum bachelor í sjúkrarøkt á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya. Vit ynskja Beintu hjartaliga tillukku við próvnum.


*Beinta Káradóttir*

**Annbritt og Elsebeth**
**prógv sum námsfrøðingar**

Fríggjadagin 8. februar fingu Annbritt Brynjolvsdóttir Jacobsen og Elsebeth Johannesen prógv sum námsfrøðingar á Føroya Læraraskúla. Vit ynskja Annbritt og Elsebeth hjartaliga tillukku við próvnum.


*Annbritt Brynjolvsdóttir Jacobsen*


*Elsebeth Johannesen*

## Føðingardagur

**Marita Guttesen 70 ár**

Mánadagin 18. februar fylti Marita Guttesen í Hoyvík 70 ár. Marita er ættað av Strondum og kom til Havnar at búgva sum átta ára gomul. Hon er útbúgvin bioanalytikari og arbeiddi á Laboratoriinum á Landssjúkrahúsinum í mong ár. Hon hevur altíð bundið, sniðgivið og gjørt nógv pløgg. Saman við øðrum hevur hon seinnu árini havt framsýningar við nýmótans klædnapløggum, bæði í Føroyum og uttanlands.

Í 1960 giftist Marita við Leivi F. Guttesen úr Vestmanna. Tey eiga fýra børn: Sunnuva, Gunnar, Helgi og Poul. Barnabørnini eru átta í tali umframt eitt langommu- og langabbabarn.

Vit ynskja Maritu hjartaliga tillukku við føðingardegnum.


*Marita Guttesen*



## Kjakkvøld um politikk og trúgv

Hóskvøldið 21. februar varð farið undir eina nýggja røð í hølunum á Brekku við kjakfundum, har evni verða tikin upp, sum á ein ella annan hátt eru trupul fyri kristin.

Kjakevnið hesaferð var trúgv og politikkur. Kjakið var ikki flokspolitiskt, og heitt varð á kjakluttakararnar um at halda seg frá at koma inn á føroyskan flokkspolitikk.

Fundurin byrjaði við, at Róland í Skorini greinaði viðurskiftini, ið stinga seg upp, tá vit royna at taka eina støðu í sambandi við kristna trúgv og politikk. Síðan varð lagt upp til kjak um evnið. Eitt áhugavert kvøld, har nógvir spurningar vóru uppi at venda.

Endamálið við kjakfundinum var ikki at royna at fáa fólk a taka støðu fyri ella ímóti nøkrum ella at prógva ella mótprógva nakað, men harafturimóti at hjálpa hvør øðrum at hugsa klárt um styrkina og veikleikan við teimum ymisku áskoðanunum.

Stigtakari og fyriskipari var Jens Wang, sum eisini var orðstýrari á fundinum.

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli eru týskvøld kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| 4. mars | Bønarlív Jesusar (Jógvan Zachariassen) |
| 11. mars | Húsbólkar (einki møti) |
| 18. mars | Einki møti |
| 25. mars | Bønarlív Jesusar (Jógvan Zachariassen) |

**Heimasíða fyri tey ungu**

Tey ungu í Lívdini hava eina tíð havt sína egnu heimasíðu, sum er www.ung.livdin.fo.

Bønarbólkur fyri kvinnur

Fyrsta leygardag í hvørjum mánað savnast bønarbólkurin fyri kvinnur.

Áhugað kunnu venda sær til: Anna Maria Anthoniussen (tel. 228826) ella Poula Sørensen (220429).

## Bíbliur til Kina

Á seinna møtinum sunnudagin 3. februar greiddi norski trúboðarin Eivind Frøen frá tí alstóru veking, sum er í Kina. Talan er um størstu veking í samkomusøguni, og tørvurin á Bíblium er ovurhonds stórur.

Við á møtinum var eisini Jeffri Johannesen, sum greiddi frá eini ætlan at útvega fígging í Føroyum til at prenta Bíbliur til Kina. Kostnaður fyri prent og útbreiðslu av einari Bíbliu í Kina er 20 kr.

Málið er, at vit í Føroyum skulu útvega Kina 100.000 Bíbliur í 2008. Ábyrgdina av tiltakinum hava Jógvan Zachariassen og Jeffri Johannesen.



*Eivind Frøen*



*Jeffri Johannesen*

Tey, sum vilja stuðla tiltakinum, kunnu flyta pening á kontu í Eik: 9181 128.239.7, viðmerkt: Bíbliur til Kina.

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 2. mars

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Missión og afturkoma Harrans*<br>*Talari: Ólavur Jøkladal* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (8)*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |



Ólavur

### Sunnudagin 9. mars

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Opið evni* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (9)*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen*<br>** Barnasigning* |

### Sunnudagin 16. mars

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Opið evni* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Evni: Pálmasunnudagur*<br>*Talari: Poul Guttesen* |

Poul



### Páskavikan

| | |
|---|---|
| Skíriskvøld 20. mars kl. 20: | *Hugleiðingar og breyðbróting (Jóh. 13-17)* |
| Langafríggjakvøld 21. mars kl. 20: | *Hugleiðingar um líðingar Jesusar* |
| Páskamorgun 23. mars kl. 12: | *Gleðihøgtíð um uppreisnina (eitt møti)* |

### Sunnudagin 30. mars

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Opið evni* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (10)*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |



Jógvan

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*